Abbin
Ein søga er um eitt húski, sum hevði abban búgvandi hjá sær, nú hann var vorðin gamal, ússaligur og risthentur.

Tá hann koyrdi niður á seg, góvu tey honum bringuklút. Men hann var líka risthentur fyri tað, og so settu tey hann í ein krók at eta, tí teimum dámdi ikki at sita til borðs við honum. Soleiðis var lagið eina tíð. Men ein dagin fingu tey okkurt at hugsa um! Lítli sonurin sat á gólvinum og telgdi eitt træpetti. “Hvat er hatta, tú telgir, lítli mín?” spurdi pápin. “Eg telgi eitt trog!” “Hvat skal tað nýtast til?” spurdi pápin. “Jú, tað skulu mamma og pápi eta av, tá ið tit verða gomul og fara at sita í krókinum, soleiðis sum abbi ger.”

Tá hugdu tey vaksnu hvør at øðrum. Teimum tókti, at hetta var egna samvitskurødd teirra, sum barnið bar fram. Tey skundaðu sær yvir til abban. “Fyrigevi okkum, at vit hava borið okkum so ljótt at ímóti tygum.”

Frá tí degi sat abbin altíð til borðs saman við teimum.

Brøðurnir Grimm